## Vísti reyv, fekk bót - og angraði

Um orsøkin var ov nógvur hiti ella ovfarakæti, sigur søgan onki um. Í øllum førum hevði ein ungur maður trongd til at lufta kastellurnar sunnumorgunin, og tað skuldi ganga útyvir politiið. Hann gjørdi ikki matari enn at hála buksurnar niðurum og at vísa reyv fyri politinum, sum gjørdi bart og handtók hann beinanvegin. Hann angraði ljótu gerðina, men fær kortini bót fyri ósømiligan atburð, sum er brot á politiviðtøkurnar.



# Tíðindafundur í Tinganes



*Løgmaður handar Jørgen Niclasen setanarbrævum, til hansara nýggja starv sum uttanríkisráðharri. Og Jóannes Eidesgaard flutti úr løgmanssessinum til at verða fíggjarmálaráðharri*

*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Fríggjadagin var tíðindafundur í Tinganesi. Fráfarandi løgmaður Jóannes Eidesgaard legði handaði Kaj Leo Johannesen lyklarnar til Tinganes, og síðani vóru øll tey nýggju landsstýrisfólkini endaliga almannakunngjørd**

FRÁSØGN
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Stúgvandi fult av fólkið var samankomið í Tinganesi fríggjadagin klokkan 16. Tað var veruliga sum sild í tunnu, og fólkini í tjóðbúna sóu rættiliga heit út.

Greitt var frammanundan, hvør skuldi gerast løgmaður, og landsstýrisfólkini hjá Fólkaflokkinum og hjá Sambandsflokkinum vóru eisini kunngjørd frammanundan. So einasti veruligi spenningurin var kring landsstýrisfólkini hjá Javnaðarflokkinum. Men tá setanarbrøvini vóru givin, kom onki av nøvnunum óvart á. Tí landsstýrisfólkini hjá Javnaðarflokkinum gjørdust júst tey somu, sum høvdu sitið í landsstýrinum frammanundan, burtursæð frá, at løgmaður fór úr løgmanssessinum og út í Fíggjarmálaráðið, meðan Helena Dam á Neystabø fór úr Løgmálaráðnum og í Mentamálaráðið og Hans Pauli Strøm misti helvtina av ábyrgdarøkinum.

### Løgmaður

Fyrst á skránni var, at Kaj Leo Johannesen skuldi fáa lyklarnar til Tinganes, har hann ætlandi skal hava arbeiðspláss næstu trý árini. Hesar fekk hann frá fyrrverandi løgmanni, Jóannes Eidesgaard.

Á tíðindafundinum vóru fólk ikki bangin fyri at rósa hvørjum øðrum, og Kaj Leo Johannesen legði út við at takka Jóannesi Eidesgaard fyri hansara virkið seinastu árini. Tá hann fekk lyklarnar, segði hann í spølni, at hann var glaður fyri at kúbeinið ikki fylgdi við. Harafturat greiddi nýggi løgmaðurin frá, hvørjar ætlanir hann hevur.

- Mín uppgáva er – hvønn einasta dag – at fáa tað besta burturúr teimum landsstýrisfólkum og teimum starvsfólkum, sum arbeiða her úti. Soleiðis at vit undir stabilum viðurskiftum kunnu røkka nøkrum av okkara málum vit hava sett í samgonguskjalið, sigur Kaj Leo Johannesen.

Samstundis legði hann dent á, at hann skal arbeiða fyri alt Føroya fólk.

### Fíggjarmálaráðið

Jóannes Eidesgaard fekk fyrsta setanarbrævið, og Kaj Leo Johannesen segði seg vera sera fegnan um at fyrrverandi løgmaður vildi verða við í landsstýrisarbeiðinum næstu árini.

Røddir hava í døgunum frammanundan verið frammi um, at Jóannes Eidesgaard ikki ætlaði sær í landsstýrið, og hesum noktaði fráfarandi ikki fyri, tá hann tosaði við Rás2 eftir tíðindafundin.

- Eg hevði gjørt upp við meg sjálvan, at tá eg fór at gevast sum løgmaður vildi eg leita mær eftir einum meira friðarligum politiskum lívið, og fyri flokkin hevði tað eisini týdning, at formaðurin var at telja millum løgtingsumboðini, so mann kundi dugna tí arbeiðinum meira, greiddi Jóannes Eidesgaard frá.

Men legði afturat, at nógv gott fólk hevur heitt á hann, um at gerast landsstýrismaður í fíggjarmálum, og tað var orsøkin til, at hann tók av.

Fíggjarliga sær ikki líka gott út sum tað onkuntíð hevur gjørt, men í samgonguskjalinum stendur at fíggjarlógin ikki skal hava hall. Men nýggi fíggjarmálaráðharrin var ikki samdur við hesi ætlan.

- Mann skal ikki rokna við, at tað verður nakað yvirskot á fíggjarlógini í komandi árið, men sjálvandi skal ein og hvør samgonga hava yvirskot á fíggjarlógini, og er málið at fáa mest burturúr hvørjari krónu, sum skattgjaldarin letur. Men týdningarmest er at fáa fleiri inntøkur til samfelagið. sigur Jóannes Eidesgaard um avbjóðingarnar í sínum nýggja starvið.

### Uttanríkisráðið

Fyri fleiri døgum var greitt at Jørgen Niclasen skuldi gerast nýggjur uttanríkisráðharri. Sum skiltist úr samráðingunum til hesa nýggju samgonguna, var tað stórt stríð um Uttanríkisráðið, sum á onkran hátt eisini hevði skuldina í at seinasta samgongan slitnaði.

Til spurningin um júst hølunum, svarar Jørgen Niclasen, at tað ikki er nakað hann hevur gjørt nakað við, men væntar ikki at fáa nakrar trupulleikar av tí.